## DAGSINS MEINING

# Kongsjørðin

Landstýrið skjýtur nú upp at privatisera kongsjørðina. Hetta er ein gamal kongstanki hjá Fólkaflokkinum og er hettar ikki fyrstu ferð málið er frammi.

Hettar er eitt álvarsmál havandi í huga, at stórt sæð øll tann syðra helvtin av Streymoynni er kongsjørð. Hetta merkir, at stór virði verða latin nøkrum fáum, uttan at onnur fáa høvi so mikið sum høvi at bjóða upp á hesar landsins ognir. Um man sum Fólkaflokkurin gekk inn fyri privatisering, so hevði ivaleyst verið rættari at bjóða jørðina út. Hettar tykist vera eitt sera gott dømi um Fólkaflokksprivatisering, har landsins ognir verða latnar nøkrum fáum til ein bíligan penga.

Eitt sera luftugt hugtak sum búnaðarvirði skal setast á jørðina fyri at fáa ein sølupris, men eingin veit rættiliga hvat tað merkir. Merkir búnaðarvirði tað, ið jørðin kann bera, hevur borið ella ber í løtuni?

Jørðin, ið nú skal latast nøkrum fáum, kann potentielt vera verd nógvar milliónir um heilt fá ár. Hvussu er til dømis við Hoyvíkshaganum og øðrum hagum á Streymoynni?

Tað kann væl vera, at fólk nú eru greið yvir, at kongsjørðin ikki skal kunna seljast til byggispekulatión og annað, men hvussu verður um 10 — 15 ár? Tá er vandi fyri, at menn fara at rópa upp um privatan ognarrætt, og hava púra gloymt, at teir hava móttikið skattgjaldarans ogn nøkur ár frammanundan til ein bíligan penga. Tað hevur man mangan sæð fyrr í øðrum vinnum. Hvussu nógvir reiðarar í dag, viðganga til dømis, at teir ikki høvdu sitið sum teir sita í dag, um ikki landið hjálpti?

Tann stóri spurningurin er hví, kongsjørðin skal privatiserast. Ger tað nakað, um landið og harvið skattgjaldarin eigur jørðina? Ideologiskt er Fólkaflokkurin ímóti landsjørð, men hvat sigur Tjóðveldisflokkurin? Privatisering av kongsjørðini kemur neyvan at fylla nógv í skiftisgrunnin.

Vil Tjóðveldisflokkurin standa modell til fólkafloksprivatisering? Fryktandi er fyri, at spinkla fullveldissemjan, kemur at geva Fólkaflokkinum frítt spæl at gjara landsins ognir út á fáar hendur til undirprís, tað, ið eftir er av hesum valskeiðnum. Vónandi er gamla alliansan á vinstravonginum millum Javnaðarflokkin og Tjóðveldisflokkin ikki burtur med alla vegna fornermilsi í nýggja vonginum av Tjóðveldisflokkinum, ið tykist undirmeta vandan í tí høgraráki, ið alsamt meira ger seg galdandi í føroyska samfelagnum.

**Sosialurin**

## NØVN Í VIKUNI

### Ellindur Kallsoy 60 ár



Sunnudagin 11. mars fylti Ellindur Kallsoy á Eiði 60 ár.

Ellindur er eiðismaður burturav, hóast hann fyrstu trý árini búði við Gjógv, har pápin var lærari. Ellindur er sonur Kristionnu og Johan Kallsoy, fyrrverandi lærara.

Ellindur hevur sum føroyingar flestir verið sjómaður ein part av lívinum. Skips- og útróðrarmaður. Hevur tó nógvu seinnu árini arbeitt hjá Landsverkfrøðinginum í Norðureysturoy.

Men eitt, sum eyðkennir Ellind fram um flestu fólk, er hansara ótrúligi musikalitetur. Hann dugir at fáa mestsum alt, sum láta kann, at spæla.

Ikki hevur tað eftir fremmand, sum sagt plagar at verða. Pápin, Johan Kallsoy, var eisini maður við tónlistarligum evnum. Bæði til sang og spæl og gjørdi eisini sangløg. Okkurt er kent frá sangum í Songbók Føroya Fólks.

Ellindur hevur kanska mest brúkt síni musikalsku evni í Eiðis Ljómfelag, har hann spældi fyrstu cornett, tey árini felagið var virkið frá seinast í sekstiárunum og eini 15- 20 ár fram. Onkuntíð var hann frá, tá hann var til skips. Men evnini eru slík, at tað skuldi ikki tann stóra venjingin til at koma við aftur beinanveg, hanna aftur var tøkur. Og eisini í sangkórinum á Eiði var Ellindur við.

Á bygd var ikki soleiðis fyrr sum nú, at ferðandi musiklærarar komu við jøvnum millumbilum at læra fólk at spæla. So har var neyðugt at brúka tey, sum dugdu slíkt. Á Eiði var tað so heppið, at har vóru fleiri, sum dugdu at leika urgu, og Ellindur var ein teira, sum heitt varð á at vera organistur í kirkjuni.

Og so var tað harmonikan. Hon varð mangan tikin fram, tá dansur var. Og eisini har hevur Ellindur mangan víst síni evni.

Tað er nú helst ikki bara eftir dagfestingini, hann er føddur - ellivta mars - at hann er uppkallaður. Lærarafólkini Kallsoy høvdu stóran barnaflokk. Tólv vóru tey í tali. So tá tann ellivti var drongur, sum føddur varð ellivta í mánaðinum, var kanska ikki so ringt at finna navnið Ellindur Kallsoy.

### Jógvan Thomasen, Viðareiði 70 ár

Í gjár, Grækarismessudag fór ein vælkendur viðingur um tey sjeyti.

Tað er Jógvan Thomasen, vanliga nevndur Jógvan á Oksakletti. Jógvan er sonur teirra Andreu J. Isaksen av Kirkju og Marius Thomasen á Oksakletti á Viðareiði.

Farin úr skúlanum tókst hann við alt vanligt arbeiði bæði innan- og uttangarðs, sum tá var vanligt á bygd.

Hann róði út, og telist millum teir mongu her norðuri sum hava troytt Norðhavsins nær- og fjarmið.

Í 1948 mynstraði hann við »Oyrnafjalli« men noyddist í land, aftaná nakrar mánaðar, vegna sjúku. Tá hann gjørdist frískur varð aftur lagt til brots. Hevur eitt nú verið við »Svínoynni«, »Carlton«, »Havfrúnni« og »Norðingi«.

Ella sum skaldið tekur til: »Hann hevur stríðst og strevast við Grønlands ísbardu strendur, og undir Íslandi har Jøkulsbrandar um himin fuku«.

Jógvan legðist uppi í 1976, tá hann fór at arbeiða hjá Landsverkfrøðinginum, og var m.a. við til at gera Múlavegin og gavst at arbeiða tá hann rakk pensiónsaldur, tí tá var heilsan farin at bila.

Hann er hegnismaður av teimum frægu. Tað sæst á snøggu og framúr væl røktu sethúsum og úthúsum hansara eysturi á Oksakletti, og annars øllum hann letur úr hondum.

Javnaðarmaður hevur hann verið frá ungum av og hevur verið stillari floksins til løgtingsval.

Jógvan er giftur Maud F. Hansen av Viðareiði. Hon er dóttir Elsebeth ið var ættað úr Innarstovu í Kunoy og Elias Hansen av Viðareiði (Lias hjá Karli).

Jógvan og Maud eiga børnini Henning, Bent Kristian og Andreu.

Tøkk fyri trúfesti og vinarlag. Verð hjartaliga heilsaður á sjeytiára degnum.

**Vi.**

†

Tað verður kunngjørt at góða mamma, vermamma og omma okkara

**ANNA OLSEN**
**í Valinum**
**Tvøroyri**

andaðist 08. mars 83 ára gomul.

Jarðarferðin verður onsdagin kl. 14.00 úr Tvøroyrar kirkju.

Fyri tey avvarðandi
**Maud**

Sosialurin

**Sosialurin**
Stovnaður: 1927
**Ábyrgdarblaðstjóri:**
Jan Müller jan@sosialurin.fo
**Blaðstjóri:**
Eirikur Lindenskov eirikur@sosialurin.fo
**Tíðindaleiðari:**
Jústinus Eidesgaard justinus@sosialurin.fo
**Marknaðardeild:** lysing@sosialurin.fo
Jonhard Hammer jonhard@sosialurin.fo
Marjun Dalsgaard marjun@sosialurin.fo
Gudny Langgaard gudny@sosialurin.fo
**Blaðfólk:**
Áki Bertholdsen aki@sosialurin.fo
Eyðun Klakstein eydun@sosialurin.fo
John Johannessen john@sosialurin.fo
Edvard Joensen edvard@sosialurin.fo
Turið Kjølbro turid@sosialurin.fo
Stefan í Skorini stefan@sosialurin.fo
**Mentan:**
Birgir Kruse birgir@sosialurin.fo
**Ítróttur:**
Jákup Mørk jakup@sosialurin.fo
**Myndamenn:**
Jens Kristian Vang jensk@sosialurin.fo
Álvur Haraldsen alvur@sosialurin.fo
**Sosialurin í Norðoyggjum:**
Postsmoga 231
Nólsoyar Pálsgøta 1
700 Klaksvík
tel. 458686 fax 458687
e-post: klaksvik@sosialurin.fo
**Útgevari/uppseting:**
Sp/f Sosialurin
Prent: Prentmiðstøðin

**Avgreiðsla:**
Mán.-frí. 8-16
Argjavegur 26,
Tel. 311820, Fax 314720
**Postadressa:**
Postboks 76, 110 Tórshavn
**E-mail:**
post@sosialurin.fo
lysing@sosialurin.fo
lysingartorg@sosialurin.fo

Blaðið verður prentað mánadag-fríggjadag klokkan 14[00]

**Lýsingar**

| **Freistir:** | Tekstlýsingar | Størri lýsingar | Lýsingartorgið | Heilsanir |
|---|---|---|---|---|
| Týsdagsblaðið | Mán.kl. 10 | Frí. kl. 15 | Frí. kl. 12 | Frí. kl. 12 |
| Mikudagsblaðið | Týs. kl. 10 | Mán. kl. 15 | Mán. kl. 12 | Mán. kl. 12 |
| Hósdagsblaðið | Mik. kl. 10 | Týs. kl. 15 | Týs. kl. 12 | Týs. kl. 12 |
| Fríggjadagsblaðið | Hós. kl. 10 | Mik. kl. 15 | Mik. kl. 12 | Mik. kl. 12 |
| Leygardagsblaðið | Frí. kl. 10 | Hós. kl. 15 | Hós. kl. 12 | Hós. kl. 12 |

Størri lýsingar, sum nógv arbeiði stendst av, mugu vera inni í góðari tíð og áðrenn ásettu freistir.
Framíhjápláss má umbiðjast í góðari tíð.

**Stødd:**
Ein heil síða í Sosialinum er 254mm breið og 346mm í hædd. Breiddin á einum teigi er 39mm og rúmið millum teigarnar er 4mm.

Ein heil síða í Sosialinum er 254mm breið og 348mm í hædd. Breiddin á einum teigi er 39mm og rúmið millum teigarnar er 4mm.



# Hepnasti í heiminum

**So mikið áhugaverda og spennandi metir royndi boristjórin hjá BP, John Thorogood uppgávuna vera at standa fyri fyrstu boringini hjá felagnum á føroyska landgrunninum, at hann metir seg sum hepnasta oljuarbeiðara í verðini**

FYRIREIKING TIL OLJULEITING
*Jan Müller*



*– Hetta er ein ótrúliga spennandi uppgáva fyri meg at vera ein tann fyrsti, sum kemur at bora í hesum økinum sigur John Thorogood*

*Mynd Jan Müller*

John Thorogood eitur hann, maðurin, sum skal tryggja BP, at alt gongur, sum tað skal, tá borurin umborð á pallinum Jack Bates um góðar tríggjar mánaðir snarar seg niður gjøgnum undirgrundina úti á 1100 metra dýpi í ein landssynning úr Suðuroynni.

Hann er ikki ein og hvør í oljuvinnuni. Telist millum teir mest royndu boristjórarnar hjá BP og við serstakari vitan um nettupp at bora á djúpum vatni við ringum veðri og hørðum streymi.

John Thorogood hevur arbeitt í oljuvinnuni í 27 ár tvs. at hann er næstan eins gamal oljumaður og oljuvinnan hevur verið í Norðsjónum. Leiðslan í BP hevur valt hann til uppgávuna at standa fyri fyrstu boringini á føroyskum øki. Og John heldur seg vera heimsins hepnasta oljuborara. Hann dylur ikki fyri, at hetta er dreymauppgáva honum er liti upp í hendi, tí talan er um at bora fyrstu ferð í einum heilt nýggjum og jomfrúuligum øki, sum hevur heilt sínar egnu reglugerðir og lógir og skipan fyri oljuleiting. Ikki minst hesa avbjóðing dámar honum væl, og tað er fyri at tryggja sær innlit í okkara skipanir og reglur, at hann hevur vitjað í Føroyum hesar seinastu dagarnar.

### Byrjaði í India í 73

Sjálvur byrjaði hann sum borimaður á einum dampriknum boripalli á landi í India í 1973. Síðani hevur hann arbeitt mest sum um alla verðina, í Nigeria, Tunis, Marokko, Bolivia, Mexikanska Flógvanum, Alaska, Vietnam, Australia fyri so at enda í Norðsjónum og nú loksins á føroyska landgrunninum.

John Thorogood, sum hevur útbúgving sum maskinverkfrøðingur umframt aðra víðari útbúgving, hevur í stóran mun tikist við at finna tøkniligar loysnir í sambandi við oljuleiting. Hann hevur verið við til at designa boripallar og til at menna ta útgerð, sum skuldi forða fyri “blowoutum”, tá rakt varð við gasslummar. Frá fyrstan tíð var hann hjá Britoil, sum seinni varð yvirtikið av BP. Í 1974 fekk hann fleiri uppgávur í Norðsjónum bæði við at designa boripallar og gera tøkniligar kanningar og analysur.

At hann nú skal til arbeiða á Atlantsmótinum hevur so eisini nakað við hansara fortíð í hesum forvatninum at gera. Tá byrjað varð at borað á djúpum vatni vestan fyri Hetland í 80-unum var John eisini millum teirra, ið stóð fyri boringini. Har var hann við til at fáa bilbugt við at arbeiða í einum øki við ringum veðri, hørðum streymi osfr.

Frá 1996 hevði hann so til uppgávu at standa fyri fyrstu boringunum úti á Vøringslættanum, ið er sera djúpt vatn og ein partur av tí sama jarðfrøðiliga øki vit hava um okkara leiðir. John sigur, at hann her eisini lærdi sera nógv um norsku loyviskipanina og treytirnar í hesum sambandi.

### Verið glaðir fyri Buvik

Og nú hann er komin til Føroya umleið fimm ár seinni er hann sera fegin um at síggja, at ein norðmaður, Alex Buvik stendur á odda fyri teimum skipanum, sum skulu galda fyri trygd, heilsu og umhvørvi í sambandi við fyrstu boringina. – Tit eru sera heppin at hava ein slíkan mann sum Alex Buvik til at taka sær av hesum so týðandi partinum av oljuleitingini, tí hann hevur dugað at tikið tað besta frá 20 ára royndum í norskari oljuvinnuni og solda tað frá, sum ikki egnar seg til føroysk viðurskifti. Og John Thorogood heldur fram:

– Eg kann bert siga, at eg eri so ótrúliga fegin um at hava fingið hesa uppgávuna í Føroyum, tí hon er eitt so einastandani høvi at vera við í einum heilt nýggjum øki, sum vil gera sínar roynir við hesi vinnu sigur John Thorogood, sum ikki fjalir yvir, hvussu væl honum dámar oyggjarnar og fólkið her býr. Sjálvur er hansara besta frítíðarítrív at ganga í fjøllunum, og tað vónar hann tíð verður til, hóast hann veit, at komandi boring fer at krevja sín mann.

Tá vit spyrja hann, hvussu tað verður at arbeiða í føroysku undirgrundini sammett við aðrastaðni sigur hann, at harðbalna veðurlagið sjálvandi hevur sína ávirkan, men hann heldur ikki, at tað verður eins trupult at bora her sum tað mangan er í t.d. Meksikanska flógvanum. Hann vísir so eisini á, at alt er so væl kannað her um leiðir, og eru tað bert 20 kilometrar til næsta brunnin í bretskum øki.

### Føroyingur við í boriliðnum

Teir verða umleið 16 mans í arbeiðsbólkinum, sum skal taka sær av boringini her. Men haraftrat koma so eisini fleiri onnur fólk, sum eru knýtt at boritiltakinum. Ein stórur partur av arbeiðinum verður gjørt úr Aberdeen, men tá nærkast boringini fara tey 16 fólkini í teaminum at arbeiða út frá Havnini. Sjálvur sigur John, at tað hevur stóran týdning, at tey, sum hava ábyrgdina av borioperatiónini eru í Føroyum, tá tað verður farið í gongd av álvara. Sjálvur fer hann at hava sæti á skrivstovuni hjá BP nærhendis Skansan. – Tað er umráðandi, at vit eru fysiskt í Føroyum, tí hendir nakað galið, so má møguleiki verða fyri at handtaka okkum her sigur hann eitt sindur skemtandi tó í ramasta álvara.

BP hevur so eisini føroysk borifólk við í arbeiðsbólkinum. Tað er Høgni Hansen frá Hansen Drilling. Hann er útleigaður til ymsar uppgávur. John Thorogood staðfestir heldur smílandi, at í dag eru 5 føroyinskir boriverkfrøðingar og út frá fólkatalinum hava føroyingar lutfalsliga fleiri boriverkfrøðingar enn t.d. bretar hava tað.

John Thorogood heldur sjálvur góðar møguleikar verða at finna olja her. Hann vísir serliga til tað, sum jarðfrøðingarnir síggja og siga. Men hann dylur heldur ikki fyri, at man kann eisini vera óheppin og einki finna. Hetta eru tað mong dømi um aðrastaðni, eisini har alt hevur bent á, at olja var til steðar. Men kortini velur John at vera bjartskygdur. Hann kennir seg eisini tryggan við at skula brúka pallin Jack Bates til uppgávuna, tí hann er so royndur í hesum økinum. Nú verða so fyrireikingar gjørdar til at fara undir boringina í sokallaða Svínoyarprospektinum.



*John Thorogood fær her undirvísing í føroyskum. Lærari er Tórður Jóansson*

*Mynd Jan Müller*